LM-067/2022

Ferðavinnufelagið

Tórshavn 3. september 2021

Hoyringssvar til náttúruverndarlóg

Ferðavinnufelagið takkar fyri møguleikan at ummæla uppskotið til náttúruverndarlóg.

Av tí at talan er um eina heimildarlóg er torført at koma við ítøkiligum viðmerkingum til lógaruppskotið, tí avleiðingarnar av uppskotinum gerast ikki greiðar, fyrr enn nærri ásetingar verða lýstar í kunngerðum. Fyri ferðavinnuna eru tað serliga ásetingarnar um økisvernd, sum eru viðkomandi, og har verður nevnt, at avleiðingarnar fyri vinnuvirksemið eru ivasamar, tí tað veldst um, hvørjar verndarásetingar verða ásettar í verndarkunngerðunum, sum skulu gerast fyri hvørt einstakt verndarøki. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur tó á fundi greitt frá, at væntað verður ikki, at avleiðingarnar fyri ferðavinnuna vera av ógvusligum slag. Tá ið verndarkunngerðirnar vera gjørdar so hvørt, ynskir Ferðavinnufelagið at vera fastur hoyringspartur.

Tað er týdningarmikið, at almannakunngerðin av verndarætlanum í grein 25 er greið og sjónlig fyri øll, sum kunnu hava virksemi í økinum. Tað kann vera torført at vita, júst hvørjar ferðavinnufyritøkur hava virksemi ella ætlanir um virksemi í teim ymsu økjunum í Føroyum, tí mælir Ferðavinnufelagið til, at í minsta lagi Ferðavinnufelagið og/ella Visit Faroe Islands fáa beinleiðis boð í almannakunngerðini. Harafturat er tað eisini týdningarmikið, at tey, sum vitan er um, fáast við ferðavinnu í økinum, eisini fáa beinleiðis boð. Mælt verður til, at grein 25 verður laga til hetta ynski.

Ferðavinnufelagið skal vísa á, at tá ætlanir eru um at seta broytingar í verk, er tað týdningarmikið, at ferðavinnan hevur rúma umstillingartíð á hálvtannað til tvey ár, áðrenn broytingarnar vera settar í verk. Hetta kemst av, at ferðavinnutilboðini eru sett saman, marknaðarført og seld hálvtannað til tvey ár áðrenn, ferðavinnutænasturnar vera framdar í verki.

Ferðavinnufelagið vil at enda fegnast um tann leistin, ið er valdur í málsviðgerðini av verndarøkjunum, har dentur verður lagdur á gott samstarv við allar viðkomandi partar, teirra millum vinnuligu áhugamálini í økjunum.

Vinarliga
FERÐAVINNUFELAGIÐ

Birita Biskopstø

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo